# TVANGSSALG

På begæring af Nuna Advokater, v/advokat Peter Schriver, Qullilerfik 2, 6., Postboks 59, 3900 Nuuk, på vegne Brdr. Lyberth A/S under konkurs, afholdes tvangssalg af skibet Louise L II hjemmehørende i Maniitsoq og beliggende på Hirtshals Havn.

Skibet sættes til tvangssalg i overensstemmelse med bekendtgørelse nr. 201 af 3. maj 1978.

Skibet er et fiskefartøj indrettet til muslingefiskeri. Det er bygget i 1977 og er opmålt til 182,02 BRT og 64,94 NRT.

Enhver interesseret opfordres til at fremkomme med bud på køb af skibet. Kopi af de vedtagne tvangssalgsvilkår og salgsopstilling kan rekvireres hos Nuna Advokater v/advokat Peter Schriver.

I øvrigt opfordres registrerede som uregistrerede rettighedshavere til at gøre deres rettigheder gældende ved det endelige tvangssalg.

Uregistrerede rettigheder over skibet, der ikke er gjort gældende inden tvangssalget af skibet, fortabes.

Endeligt tvangssalg afholdes i Grønlands Landsret, Retsbygningen, Jens Kreutzmann-ip Aqq. 1, 3900 Nuuk, torsdag d. 28. februar 2008 kl. 09.00 (kl.13.00 DK-tid)

Skriftlige bud, der skal være endeligt fastsat til et bestemt beløb, kan fremsendes til Nuna Advokater v/advokat Peter Schriver, Qullilerfik 2, 6., Postboks 59, 3900 Nuuk.

På tvangssalget vil eventuelle skriftlige tilbud blive fremlagt, og der vil for de mødende være mulighed for mundtligt overbud.

**Nuuk, den 31. januar 2008**
**Landsdommeren i Grønland**
**Postboks 1040**
**3900 Nuuk**

norden
NORÐURLANDAHÚSIÐ

## Norðurlandahúsið og Nordjobb

søkir bústað til ung fólk, ið koma til Føroyar at arbeiða í summar

Um tú hevur eina íbúð ella kamar, ið ikki verður brúkt í summar – helst atgongd til køk, so er ein upplagdur møguleiki at leiga hetta út til Nordjobbarar, ið koma til Føroyar at arbeiða í summar.

Nordjobb er ein felagsskapur, fíggjaður av Nordisk Ministerråd og Foreningen Norden, ið arbeiðir fyri at fáa ung fólk frá norðurlondum til Føroyar at arbeiða og at læra føroyska mentan at kenna. Hetta eru ung frískligfólk, ið fegin vilja royna okkurt nýtt, og sum eru áhugaði í at fáa eitt gott upplivilsi í Føroyum í summar – ynskja tygum at gerast partur av hesi uppliving, eru tygum vælkomin at seta tygum í samband við Norðurlandahúsið.

Marjun@nlh.fo ella Eydbjorg@nlh.fo

Eisini ber til at ringja til Norðurlandahúsið telefon 351351.

Les meira um Nordjobb: WWW.nordjobb.net

# Lærari/vikarur til

## Leyna- Vála- skúla

**Søkt verður eftir lærara/vikari til 9 avlopstímar frá 1. mars 2008 og skúlaárið 2007/08 at enda**

Tann, ið verður settur, skal hava:

- 2-3 árgang í: Heimstaðarlæru, kristni, frílesing, handverk og list
- 4-5 árgang í: Kristni, enskum, søgu og frílesing

Tímarnir liggja týsdag-hósdag.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við prógvum, C.V. og møguligum viðmælum, skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. februar 2008. Skulu sendast Leyna skúla, 335 Leynar.

Nærri fæst at vita um starvið hjá skúlaleiðaranum Jens Paula í Dali tlf. 421604 (skúlin) ella 220635 aftaná kl. 14.

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 00 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

# Frítíðaravloysarar

**Frítíðaravloysarar fyri sjúkrarøktarfrøðingar**

á sjúklingadeildini í tíðarskeiðnum 1. mai til 30. septembur 2008.

á anæstesideildini í tíðarskeiðnum 1. juli til 31. august 2008.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum fáast við at venda sær til Thyru Thorsteinsson fyristøðukvinnu lokal 3215.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

*Suðuroyar Sjúkrahús*
*att. umsjónarmaðurin*
*Sjúkrahúsbrekkan 19*
*800 Tvøroyri*

ella

ssh@ssh.fo

**umsóknarfreist: 25. februar 2008.**

# Tofta Arbeiðarafelag

hevur aðalfund í hølum felagsins leygardagin 23.02.2008 kl. 15.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

Uppskot til aðalfundin skulu vera felagnum í hendi í seinasta lagi leygardagin 16.02.2008.

Nevndin

Runavíkar Kommuna
søkir eftir

## Pedagogi til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**
• 1 pedagogi 25-30t um vikuna, til stovuna við børnum við serligum tørvi

**Førleikakrøv:**
Vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú blívur ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Starvið á serstovuni verður sett 1. mars 2008 ella eftir nærri avtalu. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss, leiðara ella Jastrid Weihe, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mikudagin 20 februar 2008, kl. 12.00.

***Runavíkar Kommuna***
***Heiðavegur 26***
***Postrúm 139***
***FO-610 Saltangará***

Í Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 2 barnagarðsstovur, 1 barnagarðsstova við 6-ára gomlum børnum og 1 stova til børn við serligum tørvi. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið

# Interior

v/G. Gunnbjørgsdóttir - Innanduraarkitektur

Ráðgeving innan innrætting.
Íblástur til persónligan stíl.
Vegleiðing til rætta tilfarið.
Hugskot til perfekta rúmið.
Lítil sum stór tilboð verða givin til privat hús, handlar, skúlar, matstovur o.m.a.

**tel. 258543**

*Gunnbjørg Gunnbjørgsdottir*